HOTEL VÁGAR

# LEIÐARI SØKIST

**Vit vænta at tú:**
- Arbeiðir sjálvstøðugt
- Hevur góð samstarvsevnir
- Er fyrikomandi
- Skapar góðan trivnað
- Hevur kunnleika til mál m.a. enskt

**Hotel Vágar bjóðar tær:**
- Eitt spennandi starv
- Góð starvsfólk
- Fjølbroyttar uppgávur

Á Hotel Vágum eru 25 kømur, matstova, góðar skeiðumstøður og cateringkøkur. Á hotellinum starvast 15 fólk.

Hotellið er ein partur av virkseminum hjá Flogfelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Una Danielsen tlf 340044.

Umsóknir skulu sendast til:

**Hotel Vágar**
Att.: Uni Danielsen
FO-380 Sørvágur

Umsóknarfreist 17. apríl 2000

# Serkøn pleygufamilja

Søkt verður eftir serkønari pleygufamilju til 17 ára gamlan drong við serligum tørvi.

Málið við pleygufamiljuni er at virka fyri eini tryggari og mennandi tilveru, eins og at stuðla og menna dronginum á allan hátt.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður hevur hóskandi fakliga útbúgving og royndir innan mennandi arbeiði við børnum/ungum.

Arbeiðið verður skipað í samráð við avvarðandi barnaverndarnevnd og Almannastovuna, við møguleika fyri regluligari ráð- og vegleiðing og supervisión.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært galdandi reglum.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 22.04.2000 og skulu stílast til:

**Almannastovuna**
Att. Anbjørg Apol, sosialráðgevi
Postboks 196
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið fáast á tlf. nr. 315480 lokal 134 hjá Anbjørg Apol og lokal 141 hjá Sigrun Bærentsen.

# Handilshøli

Ætlar tú at lata upp handil í miðbýnum, so havi eg eitt stórt høli, ið eg fegin vil deila við møguliga ein klædnahandil ella okkurt heilt annað.

**Bill.mrk. 71135**

## Starv sum havnaumsjónarmaður við Fuglafjarðar havn

Starv sum havnaumsjónarmaður við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leyst til setan tann **01. juni 2000** ella so skjótt sum til ber.

**Krøv:** Útbúgving sum navigatørur somuleiðis sum góður kunnleiki til enskt er ein treyt.

Lønar- & arbeiðstreytir verða sambært sáttmála millum Fuglafjarðar býráð og Føroya Skipara- & Navigatørfelag frá 05. juni 1997.

Starvið verður lønt sambært lønartalvuni fyri havnaumsjónarmenn.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristian Oluf Christiansen, havnameistara á telefon 444054 ella til Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 444006 lokal 11.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

Møguligar umsóknir saman við avriti av prógvum møguligum viðmælum skulu vera **Fuglafjarðar kommunu** í hendi í seinasta lagi mikudagin **26. apríl 2000 kl. 16.00.**

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir ella eisini onga at taka.

Fuglafjørður, tann 06. apríl 2000

**Fuglafjarðar býráð**

# Umsitingarleiðari

Á Fiskirannsóknarstovuni er starv sum leiðari av umsitingini leyst at søkja.

Starvið er beinleiðis undir stjóranum at standa fyri og leiða umsitingina av stovninum og fiskirannsóknarskipinum »Magnus Heinason«.

Til starvið er neyðugt við nøktandi útbúgving á hægri støði (HD ella líknandi) og við royndum innan umsiting og edv førleika.

Starvið verður lønt eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Miðað verður í móti at seta starvið frá 1. mai ella so skjótt sum til ber aftaná hetta.

Umsóknir við avritum av prógvum og viðmælum verða at senda Fiskirannsóknarstovuni innan 15. apríl 2000.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1, Postrúm 3051
FO-110 Tórshavn
Tlf. 315092, Fax 318264

# DANNY TRANSPORT

- tá okkurt
skal koyrast
ella goymast

**Tlf. 319192**

# Kokkur søkist

**Til matstovu okkara verður søkt eftir kokki at byrja beinanvegin.**

Vit vænta, at tú er millum 25-40 ár. Arbeiðstíðin verður uml. 160 tímar um mánaðin.

Vit bjóða tær eitt gott arbeiðspláss og góðar samstarvsfelagar. Lønin verður 20.000,- kr. um mánaðin umframt frítíðarløn.

Hevur hetta tín áhuga, vinarliga ring 21 96 96 ella 31 97 67.

RIO BRAVO Tel 319767 RESTAURANT

*RIO BRAVO • Tórsgøta 11 • Tórshavn*

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir avloysara fyri stuðulsfólk til 14 ára gamla gentu, sum er rørslutarnað.

Arbeiði hjá stuðlinum verður, í neyvum samstarvi við familjuna, Almannastovuna og onnur fakfólk, at stuðla rørsluligu menningini og annars fara við gentuni til ymisk tiltøk. Stuðulin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Arbeiði hjá stuðlinum verður 30 tímar um vikuna.

Setunartíðin er frá 01.05.00 til uml. 01.10.00.

Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving og/ella royndir at arbeiða sum stuðul, og neyðugt er at viðkomandi hevur koyrikort.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja til 314822, Ragnhild Dahl.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 24.04.00 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Eysturoyar deild
Att.: Hildur Vang
Heiðavegur
600 Saltangará

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR**
**Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



SP/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
RASMUSSEN & WEIHE

# Skrivari til oljufelag

Fyri eitt av teimum stóru oljufeløgunum verður søkt eftir einum fólki til skrivstovuna í Tórshavn. Hetta er eitt fyribilsstarv til september 2000, eftir tað kann talan møguliga verða um varandi starv. Um so verður, er hetta eitt starv við góðum framtíðarmøguleikum fyri tað rætta fólkið.

**Um starvið**

Tann, ið settur verður í starvið sum skrivari hjá skrivstovustjóranum, skal
- taka sær av postinum, skipa fyri ferðing, leggja fundir tilrættis bæði innan- og uttanhýsis, standa fyri brævaskifti, telefon, taka sær av fyrispurningum bæði innan- og uttanhýsis og hjálpa til við at greiða teir
- skipa og røkja neyðuga arkivering, bæði manuelt og elektroniskt
- framleiða tilfar (overheads, slides, tíðindatilfar) bæði til høvuðsleiðsluna og til onnur
- taka ímóti vitjandi á skrivstovuni og skipa fyri neyðugari umboðan
- gera eitt sindur av bókhaldsarbeiði.

**Krøv til umsøkjaran**
- má vera kønur í nýtslu av teldu (tekstviðgerð/rokniark/grafik/e-mail), arkivering, hava evnir at fyriskipa og leggja til rættis, t.d. at skipa fyri fundum, ferðing etc.; útbúgving er ein fyrimunur, men áhugi og royndir telja eisini nógv
- má kunna samskifta væl við onnur bæði starvsfólk og kundar, herundir føroysku oljumyndugleikarnar, høvuðsskrivstovu felagsins o.o., má vera stinnur í skrivligum enskum og føroyskum, má vera opin og fyrikomandi sum andlit felagsins úteftir
- skal hava góð evnir at skipa og raðfesta arbeiði, duga at taka stig til at veita kundunum tænastu, kunna arbeiða undir trýsti og duga at leggja tíðina til rættis
- skal kunna taka aktivt lut í skipan av organisatiónini og vera við til at fyriskipa og leiða fundir millum partar í fyritøkuni
- eigur at skilja týdningin av, at ætlanir verða fylgdar, og at arbeitt verður eftir fastløgdum stevnumiðum, mannagongdum og standardum.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Umsóknir við CV skulu sendast til P/f Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Ole Guldborg Nielsen.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018

Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

RÆTTING

# Studningar til landbúnaðin

***Allur studningur til landbúnaðin er treytaður av, at móttakarin hevur landbúnað sum vinnu, og harav er bókhaldsskyldigur og MVG-skrásettur.***
***Út frá hesum verður studningur bert latin umsøkjarum, sum hava latið skrivstovu jarðarráðsins MVG-skrásetingarskjal sítt fyri inniverandi ár og góðkendan roknskap fyri árið frammanundan.***
***Umsóknarfreistirnar skulu haldast. Árstíðarásettar freistir verða lýstar í bløðunum. Annars er mannagongdin viðv. teimum ymisku studningunum lýst niðanfyri.***

**NEYTAKJØT:**
Umsóknarfreistin er ein mánaða, frá tí at neytið er dripið. Tá allir umbidnir upplýsingar fyriliggja, verður studningurin avgreiddur so hvørt.

**STRÁFÓÐUR:**
Søkjast skal skrivliga sambært lýsing í bløðunum. Stráfóðurstudningur verður avgreiddur einaferð árliga fyri alt landið í senn.

**SÚRHOYSBRUNNAR:**
Søkjast kann alt árið. Umsókn skal sendast, tá ætlan fyriliggur, og áðrenn arbeiðið byrjar. Studningurin verður avgreiddur, tá brunnurin er liðugur, sýnaður og góðkendur.

**RÆTTIR:**
Søkjast kann alt árið. Umsókn skal sendast tá ætlan fyriliggur, og áðrenn arbeiðið byrjar. Studningurin verður avgreiddur, tá arbeiðið er liðugt og góðkent. Studningurin verður bert latin til rættir við vaskibrunni.

**VELTING:**
Ætlanirnar skulu fráboðast við eini umsókn áðrenn 1. mai, og verða góðkendar fyri at studningur kann verða settur av til fráboðaðu arbeiðini. Veltað lendið skal vera sýnað og góðkent, áðrenn studningur verður avgreiddur. Verður arbeiðið ikki liðugt, er neyðugt at søkja umaftur árið eftir. Veltistudningur verður avgreiddur einaferð árliga fyri alt landið í senn.

**KØSTAR:**
Søkjast kann alt árið tá ætlan fyriliggur. Studningurin verður avgreiddur so hvørt arbeiðið er liðugt og góðkent.

**SEYÐAKJØT:**
Hesin studningur er afturbering av goldnum meirvirðisgjaldi. Umsóknin skal sendast jarðarráðnum samstundis, sum meirvirðisgjaldið verður goldið T & S fyri farna ársfjórðingin, soleiðis at hon er okkum í hendi 20. í sama mánaði. Sostatt er seinasta freist:
okt. ársfj. 20. feb.
jan. ársfj. 20. mai
apr. ársfj. 20. aug.
juli ársfj. 20. nov.
Við umsóknini skal uppgerð og kvittan fylgja við. Studningurin verður avgreiddur so hvørt.

**MJÓLK:**
Henda studning avgreiðir jarðarráðið sambært uppgerð til MBM, sum lutar studningin út eftir innvigaðu mjólkamongdini til virkið.

***Umsóknir til studning skulu altíð vera skrivaðar á umsóknarbløð, sum fáast á skrivstovu jarðarráðsins tlf. 311180. Á hesum umsóknarbløðunum eru prentaðar studningstreytirnar.***
***Umsóknir, ið eru skrivaðar á eldri umsóknarbløð, sum ikki eru galdandi longur ella á ljóstak av umsóknarbløðum, verða ikki góðkendar.***
***Upplýsingar um studningsupphæddir o.a. fáast við at ringja tlf. 311180.***



**FØROYA JARÐARRÁÐ**
Postrúm 50 • R. C. Effersøesgøta 4 • 110 Tórshavn • tlf. 311180 • fax 311185 • teldupostur: fj@fj.fo
Telefontíð mánadag-hósdag 08.00-16.30 tó fríggjadag 08.00-16.00
(í døgurðatímanum er stongt)

# Ársaðalfundur

verður í Havnar Róðrarfelag flaggdagin 25. apríl við tilskilaðari fundarskrá.

1) Val av fundarstjóra
2) Frásøgn formansins frá farna árinum
3) Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
4) Val av nevndarlimum
5) Val av tiltakslimum
6) Val av grannskoðara
7) Møgulig uppskot av limum
8) Ymiskt.

**Havnar Róðrarfelag**

# Reingerðarfólk

Søkt verður eftir einum reingerðarfólki til Leirvíkar Skúla at byrja 1. mai 2000.

Umsóknir skulu vera Leirvíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2000.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 443006.

*Leirvík tann 6. apríl 2000*
**Leirvíkar Kommuna**

*Halt* **sosialin**